# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Duga vit líka væl sum danir at reka flogvøll?

Tað hevur fingið ilt í leiðsluna á flogvøllinum, at vit seinasta mánadag skrivaðu oddagrein um flogvøllin og hækkað gjøld til Atlantsflog.

Tráðurin í oddagreinini var at seta spurningin, hví flogvøllurin varð yvirtikin. Tað hevur verið ført fram, at tað verður ikki dýrari at reka flogvøllin, eftir at hann varð yvirtikin. Tað vísir seg kortini, at tað er dýrari, enn tað var áðrenn yvirtøkuna.

Vit kunnu sjálvandi kjakast um, hvørt ferðaavgjaldið verður goldið av Atlantsflog ella av tí, sum keypir ferðaseðil. Í øllum førum, so dýrkar tað ferðaseðilin, eins og øll onnur gjøld, sum Atlantsflog skal rinda. Tøl frá Atlantsflog vísa, at samlaða avrokningin frá flogfelagnum til Vága Floghavn er hækkað úr góðum 18 milliónum í 2007 til góðar 32 milliónir, sum er metta talið fyri 2010. Og vit nýtast heldur ikki at verða ósamd um talið á kundum - ella ferðafólkum, sum forstjórin á flogvøllinum førir fram. Vit hugsaðu um flogfeløg – operatørar – sum nýta vøllin, og har er bara tann eini.

Og tá vit seta spurningin, hví flogvøllurin varð yvirtikin, so er tað meira ein spurningur til politiska myndugleikan, heldur enn til leiðsluna á flogvøllinum. Spurningurin er, um fyrireikingini hjá Vinnumálaráðnum hevur verið nóg góð, um vit bara ikki duga líka væl sum danir, ella um danir á onkran hátt hava lumpað okkum.

Forstjórin sigur, sum rætt er, at tað kostar at reka ein flogvøll. Sjálvandi ger tað tað. Hann vísir eisini á alternativið, at undirskotið verður flutt yvir á eina almenna fíggjarlóg, sum tað hevur verið gjørt seinastu mongu árini. Tað er eisini ein politiskur spurningur, hvat vit vilja við einum flogvølli. Um tað er ein almenn uppgáva at tryggja, at fólk kunnu ferðast fyri ein rímuligan prís.

Men við at leggja flogvøllin í eitt partafelag, so hevur myndugleikin gjørt av, at hann skal rekast við teimum inntøkum, sum hann sjálvur megnar at skapa. Um hetta eru nógvar meiningar, eisini millum politikarar. Men tað skert ikki burt, at tað ikki altíð er ein fyrimunur fyri kundan – og starvsfólkini við – at tað almenna sleppur sær undan ábyrgdini á hendan hátt við at lata hesa uppgávuna til partafelagsnevnd og leiðslu at gera av.

Sosialurin fegnast eisini um at fáa betri flogvallarviðurskifti við einum longri flogvølli. Men vit høvdu fegnast enn meira, um vit fingu loyst flogvallarviðurskiftini einaferð med alla.

**Sosialurin**

## Sosialurin talar til tann primitiva innara persónin



**DÁVID REINERT HANSEN**
forstjóri, P/F Vága Floghavn

Sosialurin brúkar tann 22. feb 2010 oddagrein sína til at skriva um falskar fortreytir fyri flogvøllin. Oddagreinin kallar á tær mest primitivu kenslurnar hjá lesaranum við at rógva upp undir falsan, mistøk og ódugnasemi. Upplýsingar og tøl, ið onki hald hava í veruleikanum, verða borðreidd sum fakta.

Ein tendensiøs oddagrein, ið talar til tann innara, primitiva persónin í lesaranum, stóð í Sosialinum 22. februar.

"Dokumentatiónin" í greinini flýtur yvir av feilum, ið eru so burturúr langt við síðuna av, at tað er neyðugt at koma við einari rættleiðing.

**Ein røð av skeivum upplýsingum**
Í fyrsta broti í leiðaranum verður víst til skriv frá undirritaða um, at nýtslugjøldini hava staðið í stað í átta ár. Tað er rætt. At eg eisini geri vart við, at flogvøllurin hevur haft undirskot í sama tíðarskeiði, verður lopið um. Kunningarskrivið kann síggjast í síni heild á www.floghavn.fo

Sosialurin sigur, at veruleikin er, at Vága Floghavn hevur ein kunda. Tað er heilt við síðuna av. Vága Floghavn hevur 200.001 kundar um árið. Teir 200.000 kundarnir eru ferðafólkini, sum ferðast um flogvøllin. Tann eini kundin er Atlantsflog, sum flýgur tey til og frá flogvøllinum.

Sosialurin sigur, at upplatingartíðin er skerd. Tað er hon ikki. Tvørturímóti er hon longd við einum tíma um morgunin.

Sosialurin sigur, at nýtslugjøldini, sum Atlantsflog rindaði Vága Floghavn í 2008, vóru 18 mió. kr. Tað vóru tey ikki. Atlantsflog rindaði í 2008 fimm mió. kr. í nýtslugjøldum til Vága Floghavn.

Sosialurin sigur, at nýtslugjøldini, sum Atlantsflog rindar í 2010, verða hækkað upp í 32 mió. kr. Tað verða tey ikki. Tey eru mett at verða millum 5,3 og 6,3 mió. kr.

Sosialurin sigur, at vøksturin í gjaldinum hjá Atlantsflog er 14 mió. kr. Tað er hann ikki. Hann verður millum 0,3 og 1 mió. kr.

**Praktiskt gjald**
Viðvíkjandi hinum umleið 200.000 farandi og komandi kundunum hjá okkum, so rindaðu tey ferðandi, sum fóru av landinum, í 2008, 130 kr. í part. Tilsvarandi talið fyri 2010 verður 175 kr. í part. Tey ferðandi, sum koma til landið, rinda einki.

Av praktiskum ávum verður nýtslugjaldið kravt inn av Atlantsflog saman við ferðaseðlinum og avroknað víðari til Vága Floghavn. Men hetta gjald hevur als einki við raksturin hjá Atlantsflog at gera.

**Samanhangur er við prísin**
Sosialurin finst at, at longri flogvøllur verður settur í samband við bíligari flogferðaseðlar. Her er sjónarmiðið hjá P/F Vága Floghavn, at við einum longri flogvølli fæst møguleiki fyri nýtslu av størri og munabetri flogførum, ið við somu manning, sum tey smærru, taka fleiri ferðandi og nýta minni brennievni fyri hvønn ferðandi.

Tað eigur at gera mun í ferðaseðlaprísinum.

**Gjalda sjálvi ella undirskot á fíggjarlóg**
At reka ein flogvøll kostar pengar. Tað er neyðugt hjá P/F Vága Floghavn at hava tær inntøkur, sum hoyra til ein forsvarligan og tryggan rakstur. Og tað tykist rættvíst, at tey, sum ferðast, rinda fyri seg.

Alternativið er, at eitt undirskot skal flytast yvir á eina almenna fíggjarlóg soleiðis, sum tað hevur verið seinastu mongu árini.

**Frøast um framstig**
Tá ið tað nú eftir fleiri ára tíggju endiliga røkist fyri at fara at byggja flogvøllin út, haldi eg tað vera uppá sítt pláss at frøast um tað, heldur enn við afturhaldssinni at illneitast inn á eina uppá seg avmarkaða hækking av nýtslugjøldunum.

**Rættar upplýsingar eru neyðugar**
Sosialurin eigur at gera eitt betri kelduarbeiði og tryggja sær, at tøl og upplýsingar annars eru røtt. Á tann hátt ber eisini til at fáa oddagreinar, ið nærkast sannleikanum.

Teir 200.001 kundarnir hjá Vága Floghavn kunnu síggja fram til eina spennandi framtíð við nýggjum møguleikum og grundarlagi fyri effektivum rakstri.

## Takk fyri álitið



**ANDRASS SKAALUM**
Limur í Umboðsráðnum fyri Ognarfelag Tryggingartakaranna

Eg vil fegin takka tykkum mongu, sum góvu mær høvið at gerast limur í Umboðsráðnum fyri Ognarfelag Tryggingartakaranna.

Eg fari at virka fyri teim málum, eg havi fráboðað og eru høvuðsmálini opinleiki, kapping og virðing.

Tann 28. januar, beint undan evstamarki fyri uppstilling, avgjørdi eg at bjóða meg fram til umboðsráðsvalið og 25 tímar seinni var seðil við uppstilling latin inn. Fleiri av valevnunum høvdu tá leingi fiskað og rikið veljarar, so greitt var, at avbjóðingin hjá mær at verða valdur fór at verða stór.

Tá eg setti meg í samband við fyritøkur, ið høvdu 10 atkvøður at ráða yvir, vísti tað seg eisini, at hesar longu vóru umbidnar og játtaðar ávísum valevnum.

Av valdu umboðunum eri eg tískil sannlíkt tann, ið hevur flest 1'ara atkvøður og harvið flestu tryggingartakararnar aftanfyri mandatið.

Á heimasíðu míni komi eg at kunna um virksemið í Umboðsráðnum og Ognarfelag Tryggingartakaranna, heimasíðan kemur eisini at verða broytt, so hon betur passar til endamálið.

Enn einaferð stóra tøkk fyri álitið.

Fylg við á heimasíðuni: http://www.bricksite.com/andrass


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Jaspur Langgaard jaspur@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo
Svein Rógvi Nielsen Ljósstein sveinrogvi@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.